

og tey verða koyrd á sjúkrahús við hvør sínum bili.

### Út av lendingarbreytini

Eygnavitni fortelja fyri norskum og føroyskum miðlum, at innflúgvingin og lendingin sá vanlig út, men at flogfarið ikki steðgaði, tá ið tað skuldi. Tí fór tað útav lendingarbreytini, gleið einar 150 metrar oman av skógarklædda brattanum og varð liggjandi á síðuni, áleið 60 metrar frá sjóvarmálanum. Fá sekund seinni sóu fólk logar av eldi og svørtum royki standa upp úr skóginum, upp móti himmalinum.

### Hví hon og ikki eg?

– Størsti skelkurin var at fáa deyðsboðini um Gudruna á sjúkrahúsinum. Eg breyt fullkomiliga saman, tí eg helt meg veruliga hava sæð hana uttan fyri flogfarið. Men tað kann eg ikki hava gjørt, tí hon var funnin heilt har frammi í flogfarinum, har hon helst hevur roynt at fingið hurðina upp.

Í langa tíð droymdi eg um vanlukkuna hvørja einastu nátt. Vaknaði av marrudreymum, har eg var mitt í øllum aftur. Eisini var eg illa fyri sálarliga og krógvaði meg fyri fólki. Hevði ilt við at gleðast um lívið og saman við vinunum; kendi bara meiningsloysi við øllum og var beisk móti Atlantsflogi. Serliga brigslaði eg mær sjálvari, at tað ikki var eg, sum lat lív, men Gudrun, tí hon átti børn.

### Føroyska hetjan

Dagin eftir vanlukkuna eru bæði Føroyar og Noregi í skelki. Miðlarnir eru á tremur við frágreiðingum frá eygnavitnum, løgreglu, sløkkiliði, havaríkommisjón og umboðum fyri føroyska flogfelagið, sum eisini fær av at vita, tí norðmenn longu frammanundan hava sátt iva um trygdina hjá lítla føroyska felagnum.

Høvuðssøgan, sum prýðir forsíðurnar á størstu bløðunum hendan dagin er tó bragdið hjá 21 ára gomlu flogternuni Maibritt Magnussen, sum setti sítt egna lív í vága fyri at bjarga ferðafólkunum út, áðrenn hon sjálv leyp.

Tveir mánaðir seinni verður hon tikin fram í nýggjársrøðuni hjá norska forsætisráðharranum, Jens Stoltenberg, og eisini verður hon, saman við Gudrun, útnevnd til ársins føroying av Dimmalætting.

### Luttók á minningarhaldi

Maibritt er innløgd á Landssjúkrahúsið í tveir mánaðir og fær eisini nakrar samrøður við sálarfrøðingar. Aftan á drúgvu sjúkraleguna byrjar hon spakuliga í gamla starvinum sum flogterna. Fyrst bara nakrar smáar túrar sum ferðafólk, men seinni eisini sum flogterna.

Á eitt ára degnum fyri flogvanlukkuna luttekur hon, saman við umboðum fyri Atlantic Airwais, norskar myndugleikar og tey avvarðandi, í minningarhaldi á flogvøllinum við Stord. Tá er hon somikið kedd, at hon minnist lítið frá degnum.

Á tvey ára degnum í oktober í ár fer hon enn einaferð til flogvøllin, har hon leggur eina rósu til minnis um Gudruna. Hesaferð klárar Maibritt at luttaka á jøvnum føti við hini.

Lagnan vildi tað so, at um sama mundið fluttu Maibritt til Noregs at búgva. Har býr hon nú, og flýgur ikki longur við Atlantsflogi.

Flogvanlukkan við Stord er ikki liðugt kannað enn. Birger A. Bull, stjóri í Statens Havarikommisjon, segði so seint sum í september í ár við Stavanger Aftenblad, at enn er langt á mál, tí vraklutirnir eldfórust so illa. Tó hevur ein fyribils kanning staðfest, at orsøkin til vanlukkuna var, at flapsarnir á veingjunum fóru ikki út, sum teir áttu. Hetta hevði við sær, at ferðin tók ikki av, tá flogfarið skuldi seta seg. Tí fór tað útav lendingarbreytini og oman av brattanum. Eisini vísti kanningin, at vanlukkan gjørdist ógvusligari enn neyðugt, tí brennievnið frá tangunum lak inn í kabinuna gjøgnum rívur skrokkinum.

### Fái ongantíð svar

Dreyminum um at flúgva hevur Maibritt ongantíð slept. Eitt nú dugur hon væl at ímynda sær, at hon einaferð í framtíðini sleppur at flúgva einum flogfari sjálv sum flogskipari.

– Aftan á fleiri mánaðir kom eg til ta niðurstøðu, at eg sjálv mátti taka ábyrgd fyri at koma víðari. Nú stríðist eg ikki við vanlukkuna hvønn dag. Kanska bara annanhvønn. Men eg blívi við at spyrja meg sjálva, hví tað skuldi enda soleiðis. Serliga við Gudrun. Men eg eri komin fram til, at eg ongantíð fái svar upp á hendan spurningin. Tí vanlukkan við Stord var onki minni enn fullkomið meiningsloysi.

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

## Ársins føroyingur 2006

Dimmalætting útnevnir ársins føroying. Í dómsnevndini sita Edmund Joensen, løgtingsformaður, Jóan Pauli Joesen, rektari á Fróðskaparsetri Føroya, Heðin Mortensen, ÍSF-forseti, og Oddfríður Marni Jacobsen, formaður LISA. Heiðurin fer til tveir persónar, og í grundgevingini verður sagt: »Fyri dirvi og serstakt trúfesti við sínum arbeiði, tá ið flogvanlukkan var á Stord 10. oktober 2006, verða flogternurnar Maibritt Magnussen og Gudrun Hervør Joensen kosnar sum ársins føroyingar 2006«. Maibritt Magnussen og maður Gudruna, Oddmar Gudmundsen, taka ímóti heiðrinum á hátíðarhaldi.